

*Lagið var gott, tá uttanríkisráðharrin lendi í Vágum. Helst hevur løgmaður her fortalt eina góða, sum uttanríksráðharrin og ríkisumboðið stuttleika sær yvir*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Uttanríkisráðharrin kom til Føroya við Gulf Stream flogfarinum hjá donsku verjuni*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Uttanríkiráðharrin vitjar

**Danski uttanríkisráðharrin kom í gjár til Føroya á vitjan. Hann skal fundast við løgmann og feðast í oyggjunum**

VITJAN

*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Stutt fyri klokkan týggju fyrrapartin mánadagin lendi Gulf Stream flogfarið hjá donsku verjuni í Vágum. Umborð var Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, og fylgi, sum komu á vitjan í Føroyum.

Í Vágum vóru ríkisumboðið og løgmaður og tóku í móti, og farið var síðan við bili til Havnar, har fundast skuldi allan mánadagin.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, segði við Sosialin á flogvøllinum, at hann gleddi seg til túrin. Talan er um eina vanliga vitjan, uttanríkisráðharrin plagar at gera. At hann fyrst nú fekk tíð at koma, harmaðist hann um, men væntaði ikki, at tað fór at ávirka viðurskiftini landanna millum kortini.

Av ferðini væntaði hann sær bara góðar upplivingar. Tað ber væl til at ferðast uttan at gera gang og ónáðir, helt hann.

Per Stig Møller segði, at tað er einki serstakt stórmál, sum stendur á skránni fyri vitjanina. Tosað verður um leyst og fast á fundunum, sum vera við løgmann og aðrar avvarðandi myndugleikar, segði hann.

Hann fegnast um, at møguleiki er fyri tøttum samstarvi landanna millum, og vónar bert, at verkfallið ikki fer at forða ferðini á nakran hátt.

– Vi går hele smørrebrødssedlen igennen, og der er ikke nogle specielt ømme tæer imellem os, segði uttanríkiráðharrin.

Hann segði, at persónliga hevur honum altíð dámt væl Føroyar, síðan hann fyrstu ferð var her í 1979. Tá við Williami Heinesen sum ferðaleiðara. Ein ferð, hann altíð fer at minnast, sigur hann.

Uttanríkisráðharrin er millum annað kendur fyri at skriva bøkur, men væntar tó ikki, at tað koma nakrar bøkur um Føroyar frá hansara hond kortini.

– Det kan ikke gøres bedre, en William Heinesen allerede har gjort, sigur hann.

Maritim Lederuddannelse

Ansøgningsfrist: 16. maj 2003

I Rederiet A.P. Møller får du en maritim lederuddannelse med en verden af muligheder.

**Officersaspirant hos A.P. Møller**

Optagelsesprøver i Torshavn 28. maj 2003

DU søger udfordringer og karrieremuligheder i et internationalt miljø
- har hænderne og hovedet skruet rigtigt på
- har en studentereksamen, HTX, HF eller HHX med matematik (ansøgere med Folkeskolens Udvidede Afgangsprøve skal gennemgå Maritimt Forberedelseskursus)
- er i almindelig god fysisk form og ikke farveblind

VI tilbyder dig en udfordrende og afvekslende uddannelse til skibsofficer, og en fremtid som officer i Rederiet A. P. Møller.

Uddannelsen kan påbegyndes hvert halvår, i slutningen af juli og i starten af januar. Der er stadig ledige pladser til næste hold.

Den teoretiske del af uddannelsen foregår på SIMAC i Svendborg, den praktiske om bord på rederiets skibe.

Rekvirer materiale og ansøgningsskema ved:

**A.P. Møller Marine Department**
Telefon +45 63 21 21 00
E-mail: cadet@maersk.com

Eller download ansøgningsskema på vores hjemmeside: www.maritim-leder.dk

Rederiet A. P. Møller beskæftiger over 60.000 medarbejdere og har kontorer i mere end 100 lande.

A.P. Møller flåden tæller over 250 skibe på omkring 12 millioner tons dødvægt, og omfatter container-, tank-, bulk- og forsyningsskibe, samt specialskibe og borerigge.



MÆRSK

**Putnam pútan!**

Nú fæst hon eisini í Føroyum. Kom og royn hana, vit bjóða allan peningin aftur innan 30 dagar, um tær ikki dámar pútuna.



Opið er gerandisdagar kl. 12 - 17

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 • Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo



HØLLIN Á GILJANESI 17. MAI

ÁRSINS DANSIKVØLD VIÐ

THE BEATLES



– 1965 Ják'upsa Skegg
Sámal Ravnsfjall, Ronnie Nielsen, Ólavur Øster, Thorberg Johannesen, Jóhan Petur Andreasen

1965 - 1967 All That Rain
Pól Arni Holm, Hans Ravnsfjall, Jens Tummas Næss, Henning Nicodemussen

1967 - 1970 Showmenn
Jens Marni Hansen, Finnur Hansen, James Olsen, Jóhannus á Røgvu Joensen

**Atgongumerki:**
Kunningarstovan í Tórshavn
Kiosk Vár í Runavík
Shellstøðin í Gøtudali
Mylluni í Miðvági
– avmarkað nøgd

**Bussar:**
Eysturoy kl. 22.00, ring 21 64 64
Tórshavn kl. 22.15 og 00.30, ring 21 77 52
Heim aftur av Giljanesi kl. 03.45

Restorffs